# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit krevja okkara rætt, og fáa vit ikki tað, mugu vit bíða við nýggja ES-sáttmálanum (polski forsetin Lech Kaczynski)*

# Færri deyðadømd verða tikin av døgum

**Ivi um eiturinnspræning ger, at nógvir deyðadømdir amerikanarar sleppa at liva longri enn ætlað**

Amerikanski hægstiræftur skal taka støðu til, um tað er ómenniskjaligt og harvið í stríð við landsins grundlóg at taka fólk av døgum við eiturinnspræning. Enn hevur rætturin ikki tikið avgerð, og fleiri statir hava gjørt av at útseta ætlaðar avrættingar, meðan rætturin hevur málið. Teirra millum eru statirnir Texas og Nevada, sum hava útsett næstan allar avrættingarnar, sum skuldu fullførast í ár.

Tað ber í sær, at í ár verða ætlandi færri enn 50 fólk avrættað í amerikonskum fongslum, og so fáar hava avrættingarnar ikki verið síðani 1996, tá 45 deyðadømdir fangar vórðu tiknir av døgum. Tann seinasti fangin, sum fekk at vita, at hann sleppur í hvussu er at liva eitt sindur longri enn ætlað, var tann 36 ára gamli Christopher Scott Emmett. Hann skuldi takast av døgum í einum fongsli í Virginia í gjárkvøldið, men tað bleiv broytt í síðstu løtu.

Higartil í ár eru 42 deyðadømdir fangar tiknir av døgum í USA, harav 26 í Texas. Tann seinasta avrættingin var tann 25. september ella sama dag, sum amerikanski hægstiræftur kunngjørdi, at hann fór at kanna, um eiturinnspræning er í stríð við grundlógina. Tann deyðadømdi Michael Richard bað um at fáa sína avrætting útsetta, men orsakað av einum teldubreki kom áheitanin ikki dómaranum í hendi fyrr enn klokkan 17.20.

-Vit lata aftur klokkan 17, segði Sharon Keller, dómari, tá hon bleiv spurd, hví hon ikki gekk áheitanini frá tí deyðadømda á møti. Svarið hevur vakt ans og hevur fingið øði í tey, sum vilja hava deyðarevsingina úr gildi í USA.



*Sharon Keller, dómari, noktaði at útseta eina avrætting, tí áheitanin kom 20 minuttir aftan á skrivstovutíð hennara*

# Grannar stríðast um bráðnandi havís

**Kanada vil hava eftirlit við siglingarleiðini norðanfyri, men USA ætlar at brúka hana sum flutningsleið**

Fyri góðum hundrað árum síðani tók tað Roald Amundsen og monnum hansara trý ár at sigla ta sokallaðu Útnyrðingsleiðina millum Grønland øðrumegin og Kanada og Alaska hinumegin.

Veðurlagsbroytingarnar hava gjørt, at í summar var siglandi allan vegin, og tann nýggja farleiðin hevur longu fingið stóran áhuga. Amerikonsku myndugleikarnir hava boðað frá, at teir ætla sær at brúka farleiðina sum flutningsleið, men ta fráboðanina eru kanadiumenn ikki serliga fegnir um. Kanadisku myndugleikarnir siga, at farleiðin norðanfyri er undir kanadiskum yvirvaldsrætti, og at Kanada tí hevur rætt til at hava eftirlit við, hvat hendir í økinum.

Í einari royndi at leggja dent á sína støðu hevur Kanada ætlanir um at gera eina herstøð í tí arktiska økinum, og talsmenn hjá kanadisku sjóverjuni hava sagt, at sjóverjan fer at verja farleiðina norðanfyri á sama hátt sum onnur kanadisk sjóøki.

-Tað er okkara greiða uppfatan, at hetta er okkara sjógvur, og vit virka so út frá tí. Men amerikanarar og evropear hava eftir øllum at døma eina aðra uppfatan, sigur ovastin fyri kanadisku sjóverjuni, George Da Pont, við bretska kringvarpið BBC.



*Á hesari fylgisveinamyndini, sum er tikin tann 15. september í ár, sæst tann eystari partur av Útnyrðingsleiðini*

## STUTT SAGT

### Keypa flogfør úr Svøríki

Myndugleikarnir í Teilandi hava gjørt av keypa svensk jagaraflogfør av slagnum JAS 39 Gripen, ið verður roknað sum eitt av heimsins bestu jagaraflogførum. Upprunaliga ætlaði teilendska flogvápnið at keypa amerikonsk flogfør av slagnum F-16 CD, men amerikanska stjórnin sigur nei. Orsøkin er, at USA viðurkennir ikki teilendsku stjórnina, tí hon tók valdið við einum statskvetti. Mannarættindafelagsskapir í Svøríki eru misnøgdir við, at Teiland sleppir at keypa svensk flogfør. Svenska stjórnin hevur ikki sagt nakað um málið enn.

### Tingmenn bardust

Tað var rættiligt rok í nigeriska tjóðartinginum í gjár, tá tingið viðgjørdi eitt mál um, at tingformaðurin hevur brúkt ov nógvar pengar, og at fíggjarviðurskiftini hjá tinginum eru ógreið. Millum annað er Patricia Etteh skuldsett fyri at hava tveir almennar bústaðir og fyri at hava keypt tólv bilar upp á landsins rokning. Orðaskiftið gjørdist so harðligt, at tingmenn fóru til hendurs. Ein av tingmonnunum toldi ikki støðuna og mátti flytast á sjúkrahús við hjartatrupulleikum. Har doyði hann nakað seinni.

### Bardust við boga og ørvi

Minst fýra fólk lógu eftirá, tá tveir ættarbólkar brustu saman við ørvi og boga í indonesiska landspartinum Papua í gjár. Minst 45 onnur vórðu særd. Indonesisku myndugleikarnir hava sent 120 løgreglumenn til økið, sum er har vesturi í landinum. Løgregluovastin sigur, at partarnir brustu saman, bardust eina løtu, hildu so ein steðg og byrjaðu so aftur. Teir báðir ættarbólkarnir hava sitið illa um sátt í fleiri ættarlið og hava javnan verið í stríði.